

# Mann kundi elskað hana

**Góðan hálvan tíma seinkað kom Lynda Randle á pallin. Fólkið fekk eina fína konsert við einari kvinnu við eini úrmælingarødd**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Frammanfyri pallin til fyrstu konsertina á útipallinum á Fjarðafestivalinum 2008, stóðu eini 700 fólk, tá ið myrka kvinnan við stórum purlum, sum í útsjónd leiðir tankarnar móti Tinu Turner, kom á pallin.

Men í mun til stóru rødd sína, sá hon sera einsamøll út á pallinum. Einsamøll tí hon hevði ongan bólk og onki kór við sær, og var hetta nakað, sum ávirkaði ein stóran part av konsertini.

Men sum nevnt í yvirskriftini kundi mann elska hana, tí rødd hennara var sera kraftmikil og útstrálingini ikki verri.



*Lynda Randle hevði eina av bestu konsertunum á Fjarðafestivalinum. Harmiligt hon ongan bólk hevði*

Lynda Randle gjørdi gjøgnum alla konsertina sítt til at fáa fólkið við, men tíverri sýntist hetta ikki at ávirka áhoyrararnar, sum vístu so lítlan áhuga, at tey tað sama kundu sitið heima og lurta einari av fløgum Lyndu.

Bara til eitt lag var fólkið ordiliga við. Tað var til lagið And he will, sum hon bert stuðla við eini fløgu veruliga fekk lív í og rakti okkurt serligt inni í fólkið. Hevði hon bara havt ein bólk við, hevði hetta rokkið upp móti einari framúrskarandi framførðslu.

Við á konsertini hevði hon eisini 17 ára gomlu dóttir sína Patience, sum sang við á summum sangum, og skapti hetta heilt víst eisini eina serstaka trygga kenslu.

Til seinasta lagið hevði Lynda Randle føroysku Sólvu Ford við á pallinum, men hetta livdi ikki heilt upp til vónirnar og pallmyndin fekk onga karismatiska broyting, sjálvt um songkvinnurnar vóru tífaldaðar.

Alt í alt ein deilig konsert, sum kundi verið heilt góð og veruliga verd at elska, um Lynda Randle bert hevði havt bólk og kór við.

---

# Góðir, skitnir og glaðir



**Marstin and The Revelators vóru verdir at bíða eftir. Fólkið fekk eina framførslu, sum verður torfør hjá nøkrum øðrum at gera betri á Fjarðafestivalinum**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Teir fimm í bólkinum vóru væl klæddir tá teir trinu á pallin. Alt byrjaði við einari langari trummusolo, áðrenn karismatiski, fjákuti og kuli Martin í Grund kom á pallin at syngja um eitt súrepli.

Tekstirnir hava allir íblástur í bíbliuni, men tað kendist ikki sum at mann var til eina konsert inni í Kelduni hesa løtuna. Bólkurin breyt sera nógv frá hinum bólkunum, ið hava spælt í kvøld. Teir vóru villari, glaðari og svakari enn hinir.

Teir nýtti eisini eina rúgvu at hugskotum at fáa fólkið við. Við á pallin fingu teir einaferð eina rúgvu av flottum damum upp á pallin at blása sápubløðrur, seinni vístu teir myndir í sambandi við ein sang og eina løtu fingu teir øll fólkinum í salinum at floyta, dansa og trampa við í einum sangi um laksir.

Hesi hugskot høvdu tó onkuntíð ein prís. Til dømis tá teir vístu myndir, og áhoyrarin gjørdist eitt sindur ørkymlaður um hvat denturin skuldi leggjast á.

Stóra hæddarpunktið var, tá teir fingu Kristinu Bærentsen við sær á pallin, har tey saman sungu ein sang, ið helst kallast, I'm going down. Flotta røddin hjá Kristinu og skitna røddin hjá Martini rungaðu væl saman. Tó var ein trupulleiki, at alt ikki sá út til at vera so væl lagt til rættis í hesum sangi, og Kristina var eitt sindur uttanfyri.

Martin í Grund verður heilt skjótt ein kendur persónur í Føroyum, sum við fangandi løgum og tekstum, einari skitnari rødd, góðum rópi og nógvari sjarmu fer at leggja landi undir seg.

Synd og skomm at ikki fleiri vóru og upplivdu hendan bólk.

*Martin í Grund er uttan iva eitt sera áhugavert navn í føroyskum tónleiki*